# Ótraditionell jólakonsert

**Árliga jólakonsertin í Christianskirkjuni víkti ikki sørt frá undanfarnum árum. Úrslitið var ein forvitnislig samanseting av gomlum og nýggjum**

JÓLAKONSERT
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Klaksvíkar Hornorkestur, sum á hvørjum ári skipar fyri jólakonsertini í Christianskirkjuni, hevði í ár valt at ganga nýggjar leiðir. Í staðin fyri vanliga kórsangin, var í ár vísusangur á skránni, og nógv av kendu hornløgunum vórðu latin í nýggjan ham.



*Tey bæði hornorkestrini framførdu eina forvitnisliga skrá av jólaløgum í traditionellum og nýggjum hami*

### Horntónleikur setti dám á

Sum vant, høvdu fleiri hundrað fólk leitað sær á jólakonsertina í Cristianskirkjuni sunnukvøldið. Konsertin hevur í mong ár verið fasti tátturin, sum fyri klaksvíkingar boðar frá, at nú eru bert fáir dagar eftir til jóla. Og aftur í ár var tað horntónleikur, sum setti sín serliga dám á konsertina. Klaksvíkar Hornorkestur var sum altíð sera professionelt at lýða á, men ungdómsorkestrið smæðist ikki burtur. Tað var hugtakandi at hoyra, hvussu gott tak hesir rættiliga ungu tónleikarar høvdu á siðbundnum jólaløgum, sum tey ikki ræddust at royna í nýggjum hami.

### Nýtt og gamalt

Sum nakað heilt nýtt hevði Hornorkestrið fingið vísusangaran Stanley Samuelsen við á jólakonsertina. Við sínum vakra sangi og gittarspæli hugtók Stanley áhoyrarnar við egnum sangum umframt eldri føroyskum yrkingum, hann sjálvur hevði sett løg til. Og sum altíð tóktist tíðin at steðga á, tá Stanley sang vakra lagið »Um eg kundi kvøðið«.

Sum frá leið gjørdist Arnfríð Lutzen partur av framførsluni hjá Stanley, tá tey bæði saman sungu »Eg rósu upp sá næla«. Síðani helt Arnfríð fram einsamøll saman við Hornorkestrinum og nøkrum sera forvitnisligum útsetingunm av gomlum jólaløgum.

Við hesum væleydnaðu ótraditionellu innsløgunum á jólakonsertini hóskaði tað samstundus sera væl at enda konsertina á siðbundna mátan, tá øll í felag sungu og spældu »Gleðilig Jól«, júst sum á hvørjum ári.

## Science Fiction í Leikalund

**Komandi mikukvøld fara fløguaktuellu Science Fiction á pallin í leikalund**

FRAMFØRSLA

Fyrr í summar – á sjálvum Summarfestivaldegnum – góvu Science Fiction út tvífløguna Crossroads saman við talgildari útgávu av teirra fyrstu bandútgávu, The Runaways frá 1985. Sostatt eru tað í ár júst 20 ár ímillum fyrstu og nýggjastu útgávurnar hjá einum av teimum best umtóktu 80ara bólkunum í Føroyum.

Á framførsluni í Leikalund fara Science Fiction at spæla løg úr báðum útgávunum, so okkurt verður fyri bæði gomlu og nýggju fjepparnum.

Kvøldið verður skipað við tveimum framførslum, har tann fyrra er frá kl20.00 til umleið 21.00 og tann seinna frá 22.00 til 23.00.

**ave**

miðlahúsið í Vágsbotni



Frá nú av og til jóla verða Sudoku uppgávur at finna hvønn dag í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnirnar innan 29. desember og viðmerkið brævbjálvan "Sudoku".

Vinningurin er ein Samsung E730
+ eitt Teletíðarhald frá Føroya Tele.
Virði 3.295 kr.

Henda fartelefonin hevur so at siga alt sum skal til í eini fartelefon. Megapixel-kamera, video, MP3, Bluetooth, FM-radio, 96 Mb minni v. m. Eisini hevur E730 ein TFT-skerm við 262.000 litum.

Drigið verður millum jól og nýggjár

# SUDOKU KAPPING

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 4 | | 6 | | 3 | 2 | 5 | |
| 9 | | | 8 | 7 | | | | 1 |
| 1 | | | 9 | | 2 | | | |
| 5 | | 1 | | | | 4 | 9 | 6 |
| | 3 | | | 2 | | | 1 | |
| 7 | 9 | 8 | | | | 3 | | 5 |
| | | | 1 | | 7 | | | 2 |
| 2 | | | | 4 | 6 | | | 8 |
| | 7 | 9 | 2 | | 5 | | 4 | |

V. EASY # 13

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | 9 | | | |
| | 4 | 5 | | 2 | | | 7 | |
| 6 | | | | | | | 2 | 8 |
| | | 9 | | | 7 | 3 | | 5 |
| | | 4 | | | | 6 | | |
| 8 | | 1 | 6 | | | 7 | | |
| 1 | 7 | | | | | | | 4 |
| | 8 | | | 3 | | 2 | 1 | |
| | | | 5 | | | | | |

MEDIUM # 13

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7 | 5 | | | | | | 1 | 3 |
| | | | | | | | | |
| 1 | 9 | | 5 | | 6 | | 2 | 8 |
| 5 | | | 4 | 6 | 9 | | | 1 |
| | | | | 5 | | | | |
| 2 | | | 7 | 3 | 1 | | | 4 |
| 8 | 3 | | 2 | | 4 | | 6 | 9 |
| | | | | | | | | |
| 6 | 4 | | | | | | 5 | 7 |

EASY # 13

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | | 2 | | | | 3 | |
| | | | | | 3 | 9 | | |
| 2 | | | | | | | 4 | 5 |
| 4 | | | | 2 | 8 | | | |
| | 9 | | 1 | | 7 | | 6 | |
| | | | 4 | 3 | | | | 9 |
| 6 | 8 | | | | | | | 1 |
| | | 7 | 8 | | | | | |
| | 5 | | | | 2 | | | 3 |

HARD # 13

NAVN: ____________________ BÚSTAÐUR: ____________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin
Tórsgøta 1 · P.O. Boks 76 · FO-110 Tórshavn · Tel 34 18 00
Fax 34 18 01 · post@sosialurin.fo · www. sosialurin.fo